# handVERKARIN

3. ÁRSFJÓRÐINGUR 2010 BLAÐ NR. 35 HAVNAR HANDVERKARAFELAG





handverkarin_35_3-2010.indd 1 31/10/10 11:02:53

# Til limirnar

**Limagjald :** Limir okkara gjalda kr. 450,00 um mánaðin, harav kr. 225,00 fyri lívstrygging og kr. 225,00 fyri limaskap. Tú rindar sjálvur limagjaldið. Tú kanst gera avtalu við Havnar Handverkarafelag, um at stovna fasta flyting.

**Lívstrygging :** Lívstryggingin er obligatorisk. Tað vil siga, at allir limir hjá okkum, skulu verða við í tryggingini.

**Fráboðanarskylda :** Sum limur hjá okkum, hevur tú skyldu at boða okkum frá, um broytingar henda í tíni limastøðu.

**Eftirløn :** Tú eigur sjálvur at kanna lønarseðilin, um tú fært eftirløn og um prosentini, sum tú og arbeiðsgevarin rinda, eru samsvarandi sáttmálanum. Tú ert eisini vælkomin at ringja og vita, um tað sum stendur á lønarseðlinum, er goldið til okkum frá arbeiðsgevaranum.

**Bati :** Bati er ein sjúkragrunnur, har tú kanst fáa endurgjald, tá tú ert sjúkrameldaður. Umsóknarskjal fast á www.handverk.fo ella á skrivstovu okkara. Treytin fyri útgjaldið er, at tú og arbeiðsgevarin rinda í grunnin.

**Tímalønt:**
Tímalønin er frá 1. okt. 2010 kr. 122,91 fyri sveinar.

**Mánaðarlønt:**
Samb. lønartalvur í sáttmálanum.

**Eftirlønin:**
Arbeiðsgevarin rindar 13% og løntakarin 2% áðrenn skatt.

**Eftirlønin til lærlingar:**
Arbeiðsgevarin rindar 7,5%.

**Frítíðarlønin:**
Frítíðarlønin er 12%.

## Innihald


| | |
|---|---|
| Til limirnar | 2 |
| Skúladepilin í Marknagili | 3 |
| Sáttmálasamráðingarnar | 6 |
| Ov fáir snikkaralærlingar | 14 |
| Útferð á Leitisvatni | 16 |
| Helga Øster til minnis | 18 |
| Stásilig høli | 25 |
| Tímaløn, frítíðarløn, gjøld v.m. | 26 |



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag • Stoffalág 60 • Box 203 • 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media • **Umbróting og prent:** Gramar
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Skrivstovutíð:** Mánadag til og við hósdag frá kl 9 til 15.
Tel. 35 48 00 • Fax 35 48 01 • Teldupostur: handverk@handverk.fo • www.handverk.fo





handverkarin_35_3-2010.indd 2 31/10/10 11:02:53

# Skúladepilin í Marknagili

**FUGLARK og BIG, saman við einum føroyskum/donskum verkfrøðingatoymi, vunnu kappingina um nýggja skúlan við Marknagil.
Vinnandi uppskotið varð funnið eftir trý útveljingarumfør. Byrjað varð við undangóðkenning av fimm toymum. Síðani val av tveimum - millum fimm, og síðani, val av einum av tveimum.
Dómsnevndin var mannað við umboðum frá Mentamálaráðnum, leiðsluumboðum fyri teir tríggjar skúlarnar, fakdómara og Landsverki.**

Team Fuglark er høvuðsráðgevi. Í toyminum eru hesi feløg: Fuglark, Bjarke Ingels Group ApS, Lemming & Eriksson, Sámal Johannesen, Martin E. Leo Sp/f og KJ Elráð.

Skúladepilin í Marknagili verður væntandi 20.000 fermetrar. og sostatt størsta einstaka byggiverkætlan í Føroya søgu.



*Høgrumegin verkstaðir til Tekniska Skúla. Vinstrumegin fimleikarhøll, sum er felagshøli, ið eisini er ætlað til stórar samkomur og fundir.*



handverkarin_35_3-2010.indd 3 31/10/10 11:02:54



*Heildarmynd av skúlanum, tá ið takið er tikið omanav.*

FUGLARK og BIG saman við verkfrøðingafyritøkunum Sámal Johannesen, Martin E. Leo, KJ Elráð og Lemming & Eriksson, standa aftanfyri uppskotið til Miðnámsdepilin við Marknagil. Stovnurin skal vera framtíðakarmurin um ungdómsútbúgvingarnar í høvuðsstaðarøkinum, og skal, sum hin størsta byggiverkætlanin í Føroya søgu, hýsa studenta- og HF-útbúgvingini, sum nú heldur til í Hoydølum, handverkslærlinga-, SIT-, HT-, byggitøkningaútbúgvingunum við Tekniska skúla í Havn og FHS- og HS-útbúgvingunum við Handilsskúlan við Marknagil.

At hesum útbúgvingarstovnum eru í dag knýttir omanfyri 1000 næmingar og fleir enn 200 lærarar.

Dómsnevndin: Miðnámsdepil við Marknagil:

"Toymið hevur, heilt frá fyrstu framløgu, havt gott tak á uppgávuni. Prosjektið er greitt skipað, og hevur, heilt frá byrjan, verið eyðmerkt av greiðari nýtslugreining.".

## Snúningsdepil

Á 100m hædd á heruni við Marknagil við útsýni í allar ættir liggur Miðnámsdepilin sniðgivin sum ein snúningsdepil um lív og nám – fevnandi úteftir móti býi og landslagi og savnandi inneftir móti innara 'landslagnum' fyri læru og felagskapi. Í deplinum er hvør miðnámsbreyt, skipað sum skúli í skúlanum, har hvør breytin verður savnað um sítt læruumhvørvi samstundis sum hesi eru nátúrliga tengd at og eru partur av felagsøkjunum.

## Snið eftir nýtslu

Lærarar og næmingar á teimum núverandi trimum miðnámsskúlunum fara, sum tíðin líður, alt meiri at gerast varir við námsfrøðiliga styrkina í samvirkna skúlaumhvørvinum, samstundis sum greitt fer at vera, hvat ið nátúrliga og best virkar fyri seg.

Savningartorgið í bygningskjarnuni, gevur deplinum ímyndina av at vera ein skúli yvir hæddir og tvørturum fakbólkar. Føroyska



handverkarin_35_3-2010.indd 4 31/10/10 11:02:55



*Modell av skúladeplinum í Marknagili, sett inn í umhvørvið á staðnum.*

landslagið, við tess líðum og fløtum, er íblásturin til torgið, har trappur og flagar gerast karmur um sosialt og fakligt samskifti og tiltøk. Her er møguleiki fyri at halda matarsteðgir, gera bókkaarbeiði eins og at savnast í stóra auditoriinum. Torgið – alt sum tað er, er ein stór amphileikhøll tøk til stór sosial og faklig tiltøk.

”Vit hugsa okkum Miðnámsdepilin sum eina námsfrøðiligan varða í smúgvandi lendinum. Sniðgivin eftir innaru nýtsluni heldur enn ytru avmarkingunum.

Byggilistarliga er sniðið vorðið til sum ein veruleikagerð av funktiónalistanna gamla herrópi: Snið eftir nýtslu”

Bjarke Ingels, leiðandi ánari í BIG

”Sniðið er ímyndin av samanrunnum skúlasamleika,ið hittist og mennist í miðrúmi, á balkongum og torgi fyri haðani at verða varpað út í kringumhvørvið.”:

Jákup Pauli E. Johannesen, leiðandi ánari, FUGLARK





handverkarin_35_3-2010.indd 5 31/10/10 11:02:57

# Sáttmálasamráðingarnar



*Frá vinstru: Eli Brimsvík, Sofus Joensen, Esther Dahl, Palli Djurhuus, Henry Olsen og Magnus Magnussen.*



*Esther Dahl og Marita Rasmussen frá Vinnuhúsinum.*

## Nýggi sáttmálin

1. oktober 2010 gekk tvey ára sáttmálin við meistararnar út.

Í hesum sambandi fóru vit 29. september undir samráðingar um nýggjan sáttmála, og longu 6. oktober varð skrivað undir nýggjan tvey ára sáttmála.

Samanumtikið kunnu vit siga, at vit samdust um eina lønarhækkan uppá 3,61%. Tað gevur eina tímaløn uppá 122,91 kr.

Umframt hetta var semja um broytingar og tillagingar í sáttmálanum.

Tá vit hugsa um støðuna í samfelagnum og búskaparkreppuna, sum hevur rakt allan heimin, meta vit at samráðingarúrslitið er á einari leið.

Samráðingarnar byrjaðu 29. september kl. 13 í Vinnuhúsinum; tann dagin sótu vit við samráðingarborðið til kl. 17.30.

Fyrst varð gingið ígjøgnum krøvini frá meistarunum, punkt fyri punkt, sum vóru 16 í alt.

Síðani vóru okkara krøv viðgjørd punkt fyri punkt, tey vóru 13 í tali.

Tá vit høvdu gjøgnumgingið tilfarið var greitt, at nøkur krøv vóru samanfallandi, so tey var ikki neyðugt at dystast um.

Henda dagin samráddust vit til kl. 17.30. Tá varð avtalað at fara hvør til sítt at viðgera krøvini.

Eftir hetta høvdu vit fleiri arbeiðsfundir við Føroya Handverkarafelag.

Nýggjur samráðingarfundur var avtalaður við meistararnar at vera mikudagin 6. oktober kl. 9. Tá samráddust vit allan dagin, og umleið kl. 20 var nýggjur 2 ára sáttmáli undirskrivaður.

Sum nevnt samdust vit um eina lønarhækkan uppá 3,61%. Her eigur eisini at vera nevnt, at allar viðbøtur nú eru í %, í staðin fyri í krónum.

Og eitt nýtt øki, sum vit hava fingið inn í sáttmálan, er lønarásetan fyri styttri handverksútbúgvingar. Styttri útbúgvingar kunna til dømis vera:



handverkarin_35_3-2010.indd 6 31/10/10 11:02:59

Breyðbakarar, Kápuldragarar, Sveisarar og aðrar viðkomandi handaligar útbúgvingar.

Fyri henda bólk eru vit samd um eina lønarlegu, sum pr. 1. okt. 2010 er 117.94 kr. pr. tíma.

Setanarprógv verður nú givið sambært løgtingslóg.

Harumframt eru ymiskar umplaseringar gjørdar.

Eitt afturvendandi mál undir lønarsamráðingum síðan 2005 hevur verið um "Sjúkragrunnin BATA". Tað er vorðið okkum greitt, at meistararnir ynskja sjúkragrunnin har pipari grør. Men vit hava konsekvent gjørt greitt, at vit undir ongum umstøðum vilja samráðast um "sjúkragrunnin BATA" undir lønarsamráðingum við Føroya Handverksmeistarafelag. Vit hava gjørt greitt, at tann avtalan er lokal ímillum Havnar Handverkarafelag og Havnar Handverksmeistarafelag. Tí er tað óviðkomandi, tá vit samráðast t.d. við Føroya Handverksmeistarafelag.

Tí samdust vit um, at vit vilja taka málið upp við Havnar Handverksmeistarafelag tá lønarsamráðingarnar vóru loknar og, at vit fara at miðja eftir eini loysn innan 1. februar 2011.

**Eitt soljóðandi protokolat var eisini gjørt:**
Partarnir eru samdir um, at ein nevnd verður sett at gera reglur fyri tænastuyrkið. Her verður hugsað um kokkar,tænarar, bakarar og onnur, sum arbeiða forskotna tíð. Uppskot frá nevndini skal verða lagt fyri feløgini áðrenn 1. februar 2011.

Eisini er avtala um at arbeiða víðari við einari nýggjari álitismannaskipan, tí tann galdandi er ótíðarhóskandi.



*Palli Djurhuus, Henry Olsen, Suni Simonsen, Magnus Magnusen.*



*Eli Brimsvík og Sofus Joensen*



*Esther Dahl Vinnuhúsið og Palli Djurhuus formaður í Landsfelag Handverkari*



handverkarin_35_3-2010.indd 7 31/10/10 11:03:02

# Broytingarnar í sáttmálanum



*Magnus Magnussen og Palli Djurhuus formaður í landsfelag Handverkaranna.*

## Sum nevnt aðrastaðni í blaðnum varð skrivað undir nýggjan 2 ára sáttmála 6. oktober 2010.

Niðanfyri eru broytingarnar í sáttmálanum nevndar.

### Høvuðssáttmálin

1. Lønin hækkar soleiðis:

1. oktober 2010 við 1,80 % (t.v.s. at sveinalønin nú er 122,91 kr.)

1. oktober 2011 við 1,81%

2. Greinatilvísingarnar í §15 og §16 verða rættaðar.
3. Í § 2 verður í staðin fyri verandi orðing sett henda orðing: "Setanarprógv verða givin sambært løgtingslóg um setanarprógv."
4. Í § 10 verður yvirskriftin broytt til "Sveinalønir longri handverkaraútbúgvingar"

Sum nýggj § 11 verður sett inn: "Sveinalønir styttri handverkaraútbúgvingar.

Stk. 1. Tann 1. oktober 2010 er sveinalønin 117,94 kr.

Stk. 2. Lønin er at skilja sum minstaløn."

Restin av greinunum skifta nummar tilsvarandi.

5. § 19 verður orða soleiðis:

§ 19. Útgreinaðar reglur um koyring og burturarbeiði hjá handverkarum og serarbeiðarum
Stk. 1. Handverkari verður settur í starv eftir setanarskrivi við einum av hesum trimum møguleikunum:

A. Handverkari við føstum arbeiðsstaði

B. Handverkari við skiftandi føstum arbeiðsstaði

C. Handverkari sum veitir kundum tænastur / servicefólk



handverkarin_35_3-2010.indd 8 31/10/10 11:03:04

Handverkari settur eftir A er størsta partin av tíðini á einum arbeiðsstaði. Arbeiðsplássið er skrásett adressa hjá fyritøkuni.

Handverkari settur eftir B arbeiðir t.d. í byggivinnuni, og hevur tí ymisk byggipláss sum fast arbeiðsstað í eina ávísa tíð.

Handverkari settur eftir C veitir skiftandi kundum tænastur og koyrir regluliga út at loysa uppgávur á staðnum – vanliga kalla servicefólk, ið ikki hava fast arbeiðsstað.

Stk. 2. Skilt verður millum Útiarbeiði og Burturarbeiði.

Útiarbeiði er: Arbeiði, sum verður gjørt aðrastaðni enn á tí arbeiðsplássi, har viðkomandi er starvssettur sambært setanarskrivinum, og handverkarin kann koma fram og aftur sama dag.

Burturarbeiði er: Arbeiði, sum verður gjørt aðrastaðni enn á tí arbeiðsplássi, har viðkomandi er starvssettur sambært setanarskrivinum, og neyðugt er at gista.

Stk. 3. Ferðingartíð frá heimi og til arbeiðspláss og aftur telur sum meginregla ikki við í arbeiðstíðina.

Stk. 4. Fyri fólk sett eftir A (fast arbeiðsstað) er fylgjandi galdandi:

Útiarbeiði:

a) Tá handverkari er møttur til arbeiðis á fasta arbeiðsstaðnum og verður sendur aðrastaðni at arbeiða, og arbeiðsdagurin íroknað ferðingartíð verður longri enn 8 tímar, verður løn í ferðingartíðini goldin sambært § 18, stk. 1 og stk. 2.

b) Ferðing til útiarbeiðsplássið verður tó bara lønt í tann mun hetta tekur longri tíð enn til fasta arbeiðsstaðið.

c) Fyri beinleiðis ferðaútreiðslur verður goldið soleiðis:

i. Verður almennur flutningur nýttur millum heim og útiarbeiðspláss, verður goldið fyri ferðaútreiðslur í tann mun hesar eru størri, enn um møtt varð á fasta arbeiðsstaðnum.

ii. Nýtir handverkari egnan bil til flutningin millum heim og útiarbeiðspláss, verður samsýning latin fyri hvønn kilometur, men tó bert í tann mun hesir eru fleiri, enn um møtt varð á fasta arbeiðsstaðnum. Henda samsýning verður latin eftir teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglum hjá tí almenna. Goldið verður eisini fyri flutning við ferju, møguligt tunnilsgjald vm.

iii. Skipar fyritøkan sjálv fyri flutninginum, verður einki endurgjald latið fyri beinleiðis flutningsútreiðslur.

d) Meistarin hevur ikki skyldu at rinda fyri kost. Undantikið er tó, um handverkarin ikki visti av, at hann skuldi røkja útiarbeiði. Hettar merkir, at handverkarin skal hava boð um útiarbeiði í seinasta lagi dagin fyri. Verður hettar ikki gjørt, hevur meistarin skyldu at rinda fyri kost.



*Eli Brimsvík og Magnus Magnussen.*



*Magnus Magnussen, Poul Øregaard og Ólavuf Asafsson, Vinnuhúsið*



handverkarin_35_3-2010.indd 9 31/10/10 11:03:06

Glarmeistarin v/Poul Guttesen.



Søla og montering av
lágorkutermorútum ,
u-virði níður í 0,4 .
Einkultglas, spegl, herða glas
til brúsu–og glasveggir.
www.glarmeistarin.fo
Alt Glarmeistaraarbeiði verður gjørt. 219466-229466

Burturarbeiði (Somu ásetingar sum undir Útiarbeiði, tó við hesari broyting):

e) Meistarin hevur skyldu at rinda fyri vistarhald (kost og logi). Skipar meistarin ikki fyri vistarhaldinum, hevur hann skyldu at gjalda eftir rokning á rímuligum støði, um ikki onnur avtalað fyriliggur.

Stk. 5. Fyri fólk sett eftir B (skiftandi fast arbeiðsstað) er fylgjandi galdandi:

Útiarbeiði:

a) Ferðing til útiarbeiðsplássið verður lønt í tann mun hetta tekur longri tíð enn til fasta arbeiðsstaðið.

b) Fyri beinleiðis ferðaútreiðslur verður goldið soleiðis:

i. Verður almennur flutningur nýttur millum heim og útiarbeiðspláss, verður goldið fyri ferðaútreiðslur í tann mun hesar eru størri, enn um møtt varð á fasta arbeiðsstaðnum.

ii. Nýtir handverkari egnan bil til flutningin millum heim og útiarbeiðspláss, verður samsýning latin fyri hvønn kilometur, men tó bert í tann mun hesir eru fleiri, enn um møtt varð á fasta arbeiðsstaðnum. Henda samsýning verður latin eftir teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglum hjá tí almenna. Goldið verður eisini fyri flutning við ferju, møguligt tunnilsgjald vm.

iii. Skipar fyritøkan sjálv fyri flutninginum, verður einki endurgjald latið fyri beinleiðis flutningsútreiðslur.

c) Meistarin hevur ikki skyldu at rinda fyri kost. Undantikið er tó, um handverkarin ikki visti av, at hann skuldi røkja útiarbeiði. Hettar merkir, at handverkarin skal hava boð um útiarbeiði í seinasta lagi dagin fyri. Verður hettar ikki gjørt, hevur meistarin skyldu at rinda fyri kost.

Burturarbeiði (Somu ásetingar sum undir Útiarbeiði, tó við hesari broyting):

d) Meistarin hevur skyldu at rinda fyri vistarhald (kost og logi). Skipar meistarin ikki fyri vistarhaldinum, hevur hann skyldu at gjalda eftir rokning á rímuligum støði, um ikki onnur avtalað fyriliggur.

Stk. 6. Fyri fólk sett eftir C (servicefólk)

a) Tá fólk vera sett við seturnarskrivi í bólki C, skal serlig avtala gerðast millum arbeiðsgevara og servicefólk um arbeiðsumstøðurnar.

b) Fyri burturarbeiði verður tað sama galdandi, sum fyri setunarbólkarnar A og B.

Stk. 7. Ferðing uttanlands: Ferðing uttanlands verður samsýnt sambært teimum almennu reglunum, um eingin onnur avtala er gjørd.

Stk. 8. Nýtsla av egnum bili í samband við tænastu fyri meistarin: Nýtir handverkarin egnan bil í arbeiðsørindum, fær hann samsýning fyri hvønn koyrdan kilometur, eftir teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglum hjá tí almenna.

Stk. 9. Meistarin kann soleiðis ikki áleggja handverkaranum at nýta egnan bil í samband við arbeiði.

Stk. 10. Fyri starvsfólk sett innan 1. oktober 2007 er galdandi, at gjørdar avtalur millum handverkara og meistara ikki mugu gerast verri



handverkarin_35_3-2010.indd 10 31/10/10 11:03:06

orsakað av hesari avtalu. Broytingar í slíkum avtalum skulu tí varslast við uppsagnarfreist.

6. Í § 30 verður í staðin fyri verandi orðing sett henda orðing: "Um handverkari, sum er settur eftir handverkarasáttmálanum, ger arbeiðsmans arbeiði, skal hann ikki fara niður í løn."

7. § 37 verður strikað.

8. Báðir partar binda seg til at taka álitismannaskipanina upp aftaná, at hesar samráðingarnar eru loknar. Miðað verður ímóti at hava eina semju, áðrenn 1. februar 2011. Tá kemur nýggja álitismannaskipanin inn í sáttmálan ístaðin fyri verandi.

9. Hesar viðbøtur verða broyttar frá krónum til procent soleiðis:

Viðbøturnar fyri serarbeiðarar uttan útbúgving:

2. árið 1,45% av serarbeiðaralønini uttan útbúgving

3. árið 2,92% av serarbeiðaralønini uttan útbúgving

4. árið 4,41% av serarbeiðaralønini uttan útbúgvingo

Skiftisarbeiði:

1. bólkur
2. bólkur 6,63%
3. bólkur 9,11%

| | |
|---|---|
| Amboðspeningur: | 0,83% |
| Skitiarbeiðspeningur: | 0,41% |
| Bergholsarbeiði: | 8,28% |
| Dampketilsarbeiði: | 8,28% |
| Olju- og lýsitangaarbeiði og arbeiði í smáum tangum: | 8,28% |
| Skittfiska- og sildalastarbeiði: | 8,28% |

Fastlønarsáttmálin

1. Greinatilvísingin í § 4 verður rættað.

Lærlingasáttmálin

1. § 6 verður flutt fram til at verða § 2, stk. 2. Hinar greinarnar skifta nummar tilsvarandi.



*Jón Danielsen og Suni Simonsen.*



*Sofus Joensen, Palli Djurhuus, Henry Olsen, Magnus*



*Henry Olsen og Magnus Magnussen.*



handverkarin_35_3-2010.indd 11 31/10/10 11:03:09

2. Aftast í § 11 verður sett henda orðing: "Eftirlønin í § 8 er íroknað hesa eftirløn."

Protokollat

Partarnir eru samdir um, at ein nevnd verður sett at gera reglur fyri tænastuyrkið. Her verður hugsað um kokkar, tænarar, bakarar og onnur, sum arbeiða forskotna tíð.

Í nevndini sita Esther Dahl og Egon Joensen fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag/Føroya Handverksmeistarafelag

Daniel Pauli Djurhuus og Henry Olsen fyri Landsfelag Handverkaranna/Føroya Handverkarafelag.

Partarnir hava hvør sær ábyrgd av at taka neyðugu serfrøðina við í arbeiðið.

Nevndin skal leggja eitt uppskot til nevndirnar í Føroya Arbeiðsgevarafelag/Føroya Handverksmeistarafelag og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna innan 1. februar 2011.

Tórshavn, 6. oktober 2010

Fyri Føroya Handverkarafelag:
Henry Olsen, form.
Suni Simonsen, næstform.
Poul Øregaard

Fyri Landsfelag Handverkaranna
Daniel P. Djurhuus, form.
Eli Brimsvík, næstform.
Sofus Joensen

Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag
Jón Danielsen

Fyri Føroya Handverksmeistarafelag
Magnus Magnussen, form.
Ólavur Asafsson Olsen

Fullfíggjaði sáttmálin er í PDF á heimasíðuni: www.handverk.fo








handverkarin_35_3-2010.indd 12 31/10/10 11:03:10

# Tín samstarvsfelagi

sansir.fo

Grannskoðan
Roknskapur
Bókhald
Skattur og MVG
Partafelagsskattur
Persónskattur
Sjálvuppgávur
KT-grannskoðan
Vinnuráðgeving

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f. · Staravegur 17 · Postsmoga 3258
110 Tórshavn · Tel 34 34 34 · Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar












## Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · articon@articon.fo · www.articon.fo





handverkarin_35_3-2010.indd 13 31/10/10 11:03:16

# Ov fáir snikkaralærlingar

## Ongin snikkaralærlingur í tvey ár

Sambært hagtølunum byrjaði ongin snikkaralærlingur í 2009, og í ár er – higartil – ongin snikkara-sáttmáli gjørdur.

Fara vit nøkur ár aftur í tíðina, so siga hagtølini, at í 2002 vóru 12 snikkara-sáttmálar gjørdir, so her er talan um eina markanta aftur-gongd.

Afturgongdin hevur verið í fleiri ár sum talvan niðanfyri vísir:

Sum vit síggja so kunnu tølini sveiggja nógv t.d. var bara ein snikkarasáttmáli gjørdur í 2004. At ongin sáttmáli varð gjørdur í 2009 og ongin higartil í ár kann hava samband við, at minni hevur verið at gjørt hjá handverkarum í fjør, og higartil í ár.

Tá vit vitjaðu timburdeildina greiddi Sigmund Sørensen, lærari, frá at snikkaralærlingarnir hetta skúlaskeiðið verður dentur lagdur á vindeygu og trappur.

| 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12 | 8 | 1 | 9 | 10 | 8 | 4 | 0 | 0 |



*Frá vinstru Hans Jacob Zachariassen snikkaralærlingur, Sigmund Sørensen lærari, Kenneth Olsen lærari og Magnus Hammer Olsen snikkaralærlingur.*



handverkarin_35_3-2010.indd 14 31/10/10 11:03:17



Grettir Djurhuus snikkaralærari



## Lærarar á imburdeildini:

Á timburdeildini eru hesir lærarar: Atli Poulsen, deildarleiðari, Johan Johannesen, Benny Nielsen, Jørgen Rubeksen, Andreas Jacobsen, Sigmund Sørensen, Grettir Djurhuus, Kenneth Olsen.



Lærlingur

# Útferð á Leitisvatni

## Starvsfólk útferð við Lakeside

25. juni vóru nevndarlimir og starvsfólk hjá Havnar Handverkarafelag og Eftirlønargrunninum útferð á Leitisvatni við Lakeside (www.lakeside.fo).

Tey lata sera væl at túrinum, og siga m.a. "ein deiligur túrur við góðum mati og ikki minst dugdi Ólavur so stak væl at greiða frá ymiskum søguligum og øðrum á túrinum út til Bósdalafoss."







handverkarin_35_3-2010.indd 16 31/10/10 11:03:19





handverkarin_35_3-2010.indd 17 31/10/10 11:03:20

# Helga Øster til minnis



*Helgi Øster varð valdur til formann, tá ið Havnar Handverkarafelag varð stovnað í 1950. Tá gjørdist hann eisini formaður í Føroya Handverkarafelag.*

Mikudagin 20. oktober bórust boðini, at Helgi Øster var slóknaður 89 ára gamal. Helgi var føddur 13. oktober í 1921 á Eiði.

Hann hevði gávur sum fáur at skapa menning og virkishug har hann var staddur; hann var altíð við tí góða orðinum, og hansara lutur lá ongantíð eftir. Helgi Øster hevði stóran áhuga fyri samfelagsviðurskiftum, og varð m.a. millum teirra, sum stovnaðu Havnar Handverkarafelag 12. februar 1950. Á hesum fundi átók Helgi sær truplu uppgávuna at vera fyrsti formaður felagsins.

Tá Helgi í 2001 rundaði tey 80, høvdu vit eina samrøðu við hann. Í hesi samrøðu greiddi hann m.a. frá, at hann sum heilt ungur hevði hug at sleppa í snikkaralæru, men tað var ikki bara sum at siga tað. Tá var vónleyst at fáa lærupláss í Føroyum.

Hesin hugur var kortini so mikið stórur, at hann 14. september 1938 flutti til Danmarkar fyri at royna um hann ikki kundi fáa eina handverkaraútbúgving í Keypmannahavn. Og tað hepnaðist. Helgi fór í læru hjá donsku marinuni at læra jarnsmíð. Hann fekk læruupláss á eini skipasmiðju, sum vanliga verður nevnd "Orlogsværftet". Har fór hann í læru 26. september 1938.

Lærutíðin var 4 ár, og hann var liðugur at læra til jarnsmið 26. september 1942.

Helgi fekk bústað á einum lærlingaheimi í Rantzausgade í Keypmannahavn. Tá búðu ikki færri enn 24 føroyingar á hesum lærlingaheimi. Fyri bústaðin skuldi Helgi gjalda 10,- kr. um vikuna.

Lærlingalønin var 1. árið 7,- kr. um vikuna.
2. árið 10,- kr.
3. árið 12,- kr. og
4. árið 15,- kr. um vikuna.

Meðan hann var í læru á Orlogsværftinum, hertóku týskarar Danmark, 9. apríl 1940. Og tað, sum í dag kann tykjast undrunarvert er, at týskurin ikki alt fyri eitt hertók hesa skipasmiðju alt fyri eitt. Helgi greiddi okkum frá, at teir bæði bygdu torpedubátar og kavbátar.

**Liðugur at læra**

Tá Helgi var liðugur at læra á heysti 1942, fekk hann arbeiði sum sveinur á "Orlogsværftinum" og arbeiddi har til mars mánað 1943.

Seinni fekk hann forkunnugt starv í eini smiðju í Keypmannahavn. Í hesi smiðju varð bara arbeitt við rustfríum stáli; tað var ikki vanligt tá. Hetta var ein av teimum fyrstu smiðjunum í Danmark, sum fór undir at arbeiða við rustfríum stáli. Hetta arbeiði var ikki vandaleyst. Tað mátti Helgi sanna, tá hann ein dagin fekk ein stálsplintur inn í longutong. Meistarin visti um vandan, og gjørdi tíbetur skjótt av – bant okkurt stramt um hondina, og sendi hann skjótast gjørligt til Kommunu-



handverkarin_35_3-2010.indd 18 31/10/10 11:03:21

hospitalið. Helgi kom alt fyri eitt undir læknahond og varð skorin. Tá var splinturin komin langt upp í hondina, so kanska var hetta í síðstu løtu, at hann kom undir læknahond.

### Útisetar og felagslív í Danmark

Tey árini Helgi búleikaðist í Danmark var ríkt felags- og mentanarlív millum føroyingar í Danmark, serliga í Keypmannahavn. "Føroyingafelag" skipaði javnan fyri fundum og veitslum, sum fingu góða undirtøku, og savnaði nógvar útisetar.

Men har vóru eisini onnur feløg. Helgi var m.a. virkin í Ítróttarfelagnum, og var eitt skifti eisini nevndarlimur í hesum felag. Vit kundu eisini nevnt, at Ítróttarfelagið - uttan íhald, hevur verið virkið síðani stovnanina. Og enn savnast hópur av føroyingum, bæði vetur og summar, til ítróttarkappingar í føroyska ítróttarfelagnum í Keypmannahavn.

Helgi var eisini í felagnum "Oyggjarami", sum var stovnað undir krígnum. Hetta felag hevði tjóðskaparpolitiska stevnuskrá, og til ber at siga, at hetta felag seinni fekk stóran týdning í føroyskum politikki. Nevnast kann, at mong av teimum, sum í hesum tíðarskeiði vóru limir í "Oyggjaframa", vóru við, tá Tjóðveldisflokkurin varð stovnaður 22. og 23. mai 1948. Helgi var eisini við til hesa stovnseting, og var í ein mansaldur virkin í Tjóðveldisflokkinum.

### Helgi hittir Fridu

Tað var eisini í hesum tíðarskeiði, at Helgi hitti Fridu Hammer, sum var ættað av Toftum. Hon var tá í skrivstovulæru hjá FDB (donsku Keypssamtøkuni). Tey gjørdust góð og giftust í Keypmannahavn. Gudmund Bruun, prestur, sum hevði stóran týdning fyri føroyskar útisetar, vígdi tey 21. november 1943. Frida var nakað eldri enn Helgi, fødd 27. august 1918.
Og tað var eisini í Keypmannahavn, at Helgi og Frida gjørdust foreldur. Elsti sonur teirra, Rúni, er føddur í Keypamannahavn í 1945.

### Aftur til Føroya

Tá Helgi kom aftur til Føroya í 1946, gekk hann eina tíð sjúkur við blóðforgiftningi, men fekk nakað seinni arbeiði sum jarnsmiðjur á Tórshavnar Skipasmiðju. Tá var stórur tørvur á



*Helgi Øster og Eli Brimsvík, tá ið Helgi rundaði tey áttati.*



handverkarin_35_3-2010.indd 19 31/10/10 11:03:21

handverkarum í Føroyum. Av somu grund arbeiddu eisini fleiri danir á Skipasmiðjuni. Helgi arbeiddi 2 ár á Tórshavnar Skipasmiðju.

Í 1948 fór hann at arbeiða hjá Wenzel Petersen. Tá hevði Wenzel nógv arbeiði umborð á enskum trolarum. Teir lógu mangan á vágni - út fyri smiðjuni hjá Wenzel, sum var úti í Bakka í Havn.

Hjá Wenzel arbeiddi hann til 1964. Hetta er langt tíðarskeið, og Helgi hevði tí mangt at minnast aftur á frá hesum árum.

**Handverkarafelagið**

Tað var m.a. eisini í hesum tíðarskeiði, at Helgi kom upp í fakfelagsarbeiði og gjørdist formaður bæði í Havnar Handverkarafelag og Føroya Handverkarafelag. Mangan verður tosað um kapping millum Havnina og Klaksvíkina. Men tá talan er um handverkarafeløg, lá Klaksvíkin – í teirri tíðini – væl frammanfyri Havnina. Klaksvíkar Handverkarafelag varð longu stovnað fyrst í tríatiárunum, og Havnar Handverkarafelag varð stovnað í 1950. Stovnandi aðalfundurin varð settur í Losjuni 12. februar 1950 kl. 13.

Handverkarar í Havn høvdu frammanundan verið limir í Havnar Arbeiðsmannafelag, sum hevði eina handverkaradeild. Flestu handverkarar í Havn fingu vanliga arbeiðsmannaløn, summir fingu eitt lítið ískoyti - nøkur fá oyru.

Flestu handverkarar í Havn mettu tí, at tað var umráðandi at fáa ein sáttmála við Havnar Handverksmeistarafelag, og tí tóku teir stig til at stovna Havnar Handverkarafelag.

Tá vóru nógvir arbeiðsleysir handverkarar í Havn, og eitt tað fyrsta, felagið fór undir, var at kanna, um ikki var møguligt at fáa bygt felagnum eini hús. Her var serliga hugsað um, at tað fór at útvega arbeiðsleysum handverkarum í Havn arbeiði. Henda ætlan kom so mikið langt, at grundstykkið stóð felagnum í boði. Seinni var ætlanin kortini slept, og Drotning Ingridar Barnagarður bygdur á grundstykkið.

**Vánaligar tíðir**

Tað er væl kent, at fimmtiárini vóru vána ár í Føroyum. Nógv verkføll vóru, og mong virki fóru á húsagang. Tað var eisini í hesum tíðarskeiði, at stórir trupulleikar vóru í Sjóvinnubankanum.

Helgi greiddi okkum frá, at hann serliga mintist eina hending. Tá arbeiddi hann fyri Wenzel Petersen í Sápufabrikkini á Hálsi; tá var farið undir at leggja um frá javnstreymi til veksilstreym í Havn. Og í hesum sambandi arbeiddi hann í Sápufabrikkini.

Óneyðugt er kanska at siga, at tá var hvørki sjónvarp ella útvarp í Føroyum. Útvarp Føroya fór ikki at senda fyrr enn í 1957. Men kortini fræ ttust tíðindi skjótt, tá okkurt serligt var á vási.

Tann eina dagin legði Helgi til merkis, at okkurt var áfatt – fólk høvdu so øgiligan skund. Tá vóru tíðindi farin at ganga um, at tað stóð sera illa til í Sjóvinnubankanum, og tí skundaðu fólk sær í bankan at fáa hendur á peningi, áðrenn bankin læt aftur ella fór á húsagang.

Hetta vóru sera vánaligar tíðir, og nógv gjørdust arbeiðsleys. Hjá Wenzel Petersen vóru - eftir stuttari tíð - bara einir 5-6 mans eftir í arbeiði. Áðrenn kreppan tók seg upp, vóru teir omanfyri 20 í tali.

**Limagjaldið stórt**

Havnar Handverkarafelag fekk góða undirtøku, tá tað var stovnað.

Limirnir góðu felagnum góðan stuðul. Helgi greiddi okkum frá, at vanliga limagjaldið í fakfeløgum tá var 12,- kr. um árið. Men í Havnar Handverkarafelag varð skjótt samtykt, at limagjaldið skuldi vera 12,- kr. um mánaðin. Nakað seinni varð samtykt, at limagjaldið skuldi vera 30,- kr. um mánaðin. So tað er lætt at skilja, at limirnir ynsktu eitt gott og sterkt felag.



handverkarin_35_3-2010.indd 20 31/10/10 11:03:21



*Helgi og Frida giftust í Keypmannahavn 21. november 1943.*

**Dagskúli í Havn**

Men tíðirnar batnaðu, og umstøðurnar hjá handverkarum og handverkslærlingum batnaðu eisini. Eitt, sum eigur at vera nevnt her er, at handverkslærlingar í 1964 fingu høvi til at ganga í tekniskum skúla um dagin í staðin fyri um kvøldið.

Mangir handverkslærlingar komu tá til Havnar at ganga í Tekniska Skúla. Tí var eisini farið undir at reka skúlaheim til handverkslærlingar í Havn. Tá var Helgi settur at vera leiðari á Skúlaheiminum, sum fyrstu mongu árini hevði hús í Kongagøtu í Havn.

Seinni varð nýtt skúlaheim bygt í Marknagili. Helgi Øster var í hesum leiðarastarvið, til hann í 1992 legði frá sær vegna aldur.

**Eina dóttur og tríggjar synir**

Sum nevnt, er elsti sonur Helga og Fridu, Rúni, føddur í Keypmannahavn í 1945. Hann er útbúgvin arkitektur og arbeiðir í Havn. Í 1949 fingu tey Guðrið; hon býr í Svøríki.

Seinni fingu tey tveir dreingir, Ólav, sum er føddur í 1953. Hann er savnsteknikari á Føroya Fornminnissavni. Og Mikkjal, sum er føddur í 1963. Hann arbeiðir í Sjónvarpi Føroya.

Frida, kona Helga, andaðist 6. september 1997 79 ára gomul.

Vit í Havnar Handverkarafelag eru takksom fyri tað slóðbrótandi arbeiðið Helgi, saman við øðrum framdu fyri felagið.

Í djúpari samkenslu lýsa vit frið yvir minnið um Helga Øster.

*Eli Brimsvík, formaður*



handverkarin_35_3-2010.indd 21 31/10/10 11:03:21

# Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

**Vit bjóða m.a.**

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)






MEST

**MEST**
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo



Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo

BYGMA
BALSLEV







handverkarin_35_3-2010.indd 22 31/10/10 11:03:23




Tel 34 10 10

ATLANTIC AIRWAYS

atlantic.fo

handverkarin_35_3-2010.indd 23 31/10/10 11:03:23






handverkarin_35_3-2010.indd 24
31/10/10 11:03:25

# Stásilig hølir til ymisk endamál





1. Hølini kunnu útleigast til limir, eins og onnur uttanfyri felagið; talan kann vera um feløg, stovnar ella einstaklingar.

2. Farast skal væl um hølini, og skulu tey latast aftur í sama standi, sum tá ið tey vóru útleigað.

Møguligir skaðar á innbúgv og útbúnað undir útleigan, skal alt fyri eitt fráboðast felagnum, og fult endurgjald fyri umvæling/nýkeyp skal rindast felagnum.

3. Hølini verða leiga út til hesi endamál:

A. Vanlig tiltøk og fundir eftir vanliga arbeiðstíð.
B. Tiltøk, ið eru í vanligari arbeiðstíð og eftir vanliga arbeiðstíð.
C. Tiltøk ið fevna um meira enn ein dag.
D. Framsýningar, eftir nærri avtalu.
E. Merkisdagar (t.d. føðingardag/fermingardag)
F. Skeiðvirksemi.

4. **Prísir.**
Er talan ikki um limir er kostnaðurin við køki pr. kvøld 2.000,- kr.
Limir leiga hølini til Merkisdagar (inkl. nýtslu av køki) fyri 1.000,- kr.
.
Er talan um onnur tiltøk, sum t.d. fevna um fleiri dagar, verður nærri prísur avtalaður.



# Tímaløn, frítíðarløn, gjøld v.m.

**Tímalønin er frá 1. oktober 2010:**
**kr. 122,91 (minstaløn)**

3-ára starvsaldur gevur 1,6% lønarhækkan.
Frítíðarløn: 12%
Konto: 6460 - 299.601.6

**Limagjald og Lívstrygging:**
Limagjald + lívstrygging er 450,- kr. pr. mán. Limirnir gjalda sjálvir limagjald um ikki onnur avtala er gjørd við arbeiðsgevaran.
Konto: 9181 - 133.013.8
Konto: 6460 - 162.935.4

**Eftirløn:**
Arbeiðsgevarin: 13%
Løntakarin: 2%
Tilsamans: 15%
Konto: 9181 - 132.833.8
Konto: 6460 - 152.555.9
Vágs Handverkarafelag:
Konto 6460 - 516.417.8

**Sjúkragrunnurin BATI**
Arbeiðsgevarin:
30 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Løntakarin:
15 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Umsiting: Sjúkragrunnurin BATI
Postboks 3227, 110 Tórshavn.
Tlf. 229578 – fax: 319178. Teldupostur:
hdg@post.olivant.fo
Konto: 6460-4951044
Konto: 9181-4955791

**Lærlingar:**
Lærlingar gjalda kr. 10,- pr. viku í limagjaldi.
Konto: 6460 - 401.200.5

Lærlingalønir (% av sveinalønini)
1. árið: 32%
2. árið: 40%
3. árið: 45%
4. árið: 55%

Eftirløn til lærlingar: 7,5%
Konto: 9181 - 132.833.8
Konto: 6460 - 152.555.9

**Eftirútbúgvingargrunnurin VITAN**
Arbeiðsgevarin:
10 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Løntakarin:
10 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Umsiting: Vinnuhúsið
Postboks 1039, 110 Tórshavn.
tlf. 30 99 00 - fax: 30 99 01.
Teldupostur: mikkjal@industry.fo
Konto: 9181 - 495.879.0
Konto: 6460 - 101.278.0



handverkarin_35_3-2010.indd 26 31/10/10 11:03:26

SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR

Bil
Maskin
Smiðja
El
Timbur
Stíl@Snið









handverkarin_35_3-2010.indd 27 31/10/10 11:03:27

DYMO Esselte PILOT uni-ball LEITZ

# Skrivstovuútgerð til dyrnar




## Útkoyring

**City er heildarveitari av skrivstovuútgerð til vinnulív og stovnar. Hugmyndin er, at alt til skrivstovuna fæst á einum stað. City hevur tríggjar deildir um landið, umframt nethandilin city.fo og útkoyringartænastu.**

Sum landsins størsti heildarveitari av skrivstovu-útgerð leggja vit dent á at bjóða tað besta og størsta vøruúrvalið. Flestallar vørur, ið tit hava tørv á dagliga, eiga vit á goymslu – og skuldu vit ikki átt tær, so bíleggja vit fegin.

Prísirnir á útkoyringartænastuni eru nú broyttir, soleiðis at tú altíð veitst, hvat kostnaðurin er.

Fyri vanliga útkoyring verður tikið eitt ómaksgjald á **kr. 80**.*

Fyri bíleggingar, ið eru størri enn kr. 3.000, verður ***einki útkoyringargjald*** tikið.*

** Bert galdandi fyri útkoyringarleiðina.*

### *Skjót útkoyring*

*Bílegg **innan kl. 11** og tú hevur vøruna sama dag**

city
www.city.fo

| Tórshavn | Klaksvík | Runavík | Bílegging |
|---|---|---|---|
| 347 300 | 347 310 | 347 320 | 347 340 |



handverkarin_35_3-2010.indd 28 31/10/10 11:03:28

# Ogna tær tín egna húsavørð

*- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð*



sansir.fo

Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðaruppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.

*Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í samband við bygging og umbygging av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum.*

*Harafturat alla gólválegging: trægólv, teppi, linoleum og vinyl - eisini til vát- og baðirúm.*

**Húsavarðartænastan Spf**
Brattalíð 8 | Tórshavn
hvt@olivant.fo | Tel. 29 00 29

**Húsavarðartænastan**

# Ídnaðar- og garaguhurðar

**Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92**

## Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður

Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn




VARTA
THE BATTERY EXPERTS

[illegible]

## Battariír Til Øll Endamál

**Fartelifonir**



**Hoyri Apparatir**

**Ur og mangt annað**



**Eisini hava vit øll vanlig battariír**




**Heil- og smásøla, landsins bestu battariír, og landsins bestu prísir**

**PØLAR**

Akkumulatorhandilin v/Margeir Ørvarodd
Sigmundargøta 26 - 100 Tórshavn
tel. 31 83 47 - fax 31 83 67  fartel. 21 28 60








handverkarin_35_3-2010.indd 30    31/10/10 11:03:30





KOM TIL EFTIRLIT VIÐ TÍNUM BÚSTAÐARLÁNI

Eik Banki P/F
Tel. 348 000
www.eik.fo

Hevur tú rætta bústaðarlánið? Við Realkreditt frá Eik fært tú eina bústaðarfígging, ið hóskar júst til tín

Avtala tíð til eftirlit á www.eik.fo og/ella á tlf. 348 000




handverkarin_35_3-2010.indd 32 31/10/10 11:03:31